VESTNORDENFONDEN
MENNINGARGRUNNUR ÚTNORÐURS



# ÁRSROKNSKAPUR 2019

| *Innihaldsyvirlit* | *bls.* |
|---|---|
| Nevndarfrágreiðing | 2 |
| Átekning leiðslunnar | 4 |
| Grannskoðanarátekning | 5 |
| Rakstrarroknskapur 2019 | 7 |
| Fíggjarstøða tann 31. desember 2019 | 8 |
| Peningastreymsútgreining 2019 | 9 |
| Viðmerkingar | 10 |

**ISLAND**: SIGTÚN 42 | IS-105 | REYKJAVÍK • **POSTADRESSE**: POSTBOKS 8096 | IS-128 | REYKJAVIK
**TELEFON**: +354 530 2100 • **WEB**: www.vestnorden.is • **E-MAIL**: vestnorden@vestnorden.is
**GRØNLAND**: AQQUSINERSUAQ 48A | POSTBOKS 798 | 3900 NUUK | **TELEFON**: +299 323 431

**Ársúrslitið samanborið við úrslitið árið fyri:**
Rentuinntøkurnar hjá Menningargrunni Útnorðurs fullu í 2019 til 2,190 MDKK(2,581 MDKK í 2018). Samlaði rakstrarkostnaðurin fall til 2,918 MDKK (2,949 árið 2018).
Av burturleggingum til tap av útlánum vórðu inntøkuførdar 5,279 MDKK, meðan tað í 2018 vórðu inntøkuførdar 0,840 MDKK. Úrslitið frá rakstri, áðrenn burturleggingar, var eitt hall upp á 0,670 MDKK, móti einum halli upp á 0,310 MDKK í 2018. Úrslitið áðrenn burturleggingar var sostatt 0,360 MDKK verri enn í 2018. Úrslitið frá rakstri gjørdist eitt avlop upp á 4,609 MDKK móti einum avlopi upp á 0,530 MDKK í 2018. Í 2019 og byrjanini av 2020 vóru fleiri lán afturgoldin fyri tíð. Tað hevði við sær at samlaðu útlánini fullu, og harvið afturføring av burturleggingum til tap av útlánum.

**Virksemið hjá Menningargrunni Útnorðurs:**
Grønlandi hevur Menningargrunnur Útnorðurs ein stóran part av sínum útlánum hjá hotellum og ferðavinnufyritøkum. Hotellrakstur í Grønlandi byggir í stóran mun á at veita gisting, bæði til ferðafólk og til grønlendska fólkið, sum hevur brúk fyri gisting á sínum arbeiðsferðum. Flestu hotellini hava eisini matstovur. Ferðavinnan í Grønlandi er mest staðsett í Diskovíkini(Ilulissat) og á eysturstrondini í Kulusuk og Tasiilaq. Í Nuuk verður økt um hotellkapacitetin.
Á hesum leiðum hevur seinnu árini verið framgongd í ferðavinnuni, og tað er eyðnast at leingja tíðina, har ferðafólk vitja. Í øðrum pørtum av landinum er ferðavinnan á sama støði sum árini fyri.
Onnur útlán eru flest til handverkarafyritøkur. Virksemið er á sama støði sum árini fyri.
Ferðavinnan í Diskovíkini hevur møguleika at økja um sítt virksemi.

Í Føroyum veitir Grunnurin eisini útlán til ferðavinnufyritøkur. Tað er stórur vøkstur í ferðavinnuni. Tað sær út sum, at verandi hotellkapacitetur er fult nýttur í summarhálvuni. Hotellini hava útvegað sær fleiri hotellkømur. Tvey nýggj hotell eru nú bygd, og tað tvífaldar hotellkapacitetin í Tórshavn. Fleiri nýggj matstøð lata upp, og matskráirnar verða eisini fjølbroyttari.

Innan aðrar vinnugreinar, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur veitt fígging, eru fyritøkur, sum framleiða til nýtslu og til vinnufyritøkur. Vinnufyrtøkurnar selja sínar vørur antin til útflutnings ella eru undirveitarar til aðrar føroyskar útflutningsfyritøkur.

**Eitt lán varð útgoldið til eitt verkevni í Grønlandi:**

| | | |
|---|---|---|
| Hudplejeklinikken i Ilulissat | | |
| tænastufyritøka | 2.500.000 DKK | 15 ár |
| Útgoldin lán tilsamans til verkevni í útnorðri: | 2.500.000 DKK | |

**Nevndarinnar meting av ársúrslitinum:**
Út frá tí lága eftirspurninginum eftir nýggjum lánum, og at lán verða afturgoldin fyri tíðina, so er virksemið ikki nøktandi; men út frá tí lágu rentuni, so sær nevndin úrslitið búskaparliga sæð nøktandi. Tað eru givnar lánitilsøgnir fyri u.l. 15 MDKK, og sum verða útgoldin í 2020.

**Samstarvið við aðrar, ið virka innan vinnuframa:**
Grønland hevur samlað almennu vinnuframaskipanirnar í eina eind undir Greenland Holding, og sum samskipar tær ymsu vinnuframaskipanirnar.
Útnorðurgrunnurin hevur tætt samstarv við starvsfólkini í Greenland Holding. Greenland Holding umsitur eisini NORA í Grønlandi.

Í Føroyum eru vinnuframaskipanirnar spjaddari, men við einum óformellum samstarvi millum ymsu eindirnar. Útnorðurgrunnurin hevur samstarv við Vinnuframa. Arbeitt verður við at skipa formligt samstarv við hinar vinnuframaeindirnar. Útnorðurgrunnurin hevur gott samskifti við høvuðsskrivstovuna hjá NORA í Tórshavn.

**Skrivstovur og starvsfólk:**
Menningargunnur Útnorðurs hevur skrivstovu í Reykjavík og Nuuk. Virksemið í Føroyum verður røkt úr Nuuk. Menningargrunnur Útnorðurs hevur havt tvey fulltíðar størv undanfarin ár. Í 2019 er annað starvsfólkið farið í niðursetta tíð. Í 2020 fer starvsfólkið enn longur niður í tíð.

**Meiri sjónlig:**
Menningargunnur Útnorðurs hevur í 2019 havt lýsingar í bløðunum bæði í Grønlandi og Føroyum. Grunnurin fer í 2020 eisini arbeiða við at marknaðarføra seg sjónligari við lýsingum.

***Útlit:***

Fiskivinnan hevur stóran týdning fyri búskapin bæði í Grønlandi og í Føroyum.

Í Grønlandi er tað serliga veiðan eftir rækjum, svartkalva og toski, sum hevur týdning. Sæð sum ein heild eru útlitini fyri hesi fiskasløg í 2020 á sama støði sum í 2019. Seinnu árini hevur eisini verið veiða eftir makreli í grønlendskum sjógvi.

Í Føroyum er tað serliga uppsjóvarfiskurin, t.v.s. makrelur, sild og svartkjaftur, sum hava týdning. Útlitini fyri 2020 peika á u.l. somu nøgdir  av uppsjóvarfiski sum í 2019. Toskafiskiskapurin í Barentshavinum og á Flemmish Cap hevur eisini stóran týdning fyri føroyska fiskivinnu.
Alivinnan er u.l. helvtin av føroyska útflutninginum. Alivinna hevur seinnu árini havt stór avlop, og ger nú stórar íløgur í anlegg og útbúna.

Leitanin eftir mineralskum vørum og olju hevur verið á lágum støði; men  í 2017 læt eitt rubinnám upp; og i 2019 lat eitt anorthositnám upp. Útlit eru ikki til, at onnur nám lata upp í nærmastu framtíð. Grønlendska Sjálvstýrið hevur lagt eina strategi fyri málmvinnuna sum átaksøkið fyri árini 2019 til 2023.

Í Grønlandi eru útlitini til anleggsløgur í 2020 at tær verða á einum høgum støði. Byggingin av flogvøllum er byrjað. Arbeiðsloysið er fallandi, men er rættiliga ymiskt i teimum ymsu pørtunum av landinum. Grundað á stóru geografisku fjarstøðurnar og undirstøðukervið, er tað trupult at flyta arbeiðsfólk úr øki við arbeiðsloysi til økir, har trot er á arbeiðsfólki.

Í Føroyum hava seinnu árini bæði innan almenna geiran og í privata vinnulívinum verið gjørdar stórar íløgur. Íløguvirksemið fer at halda fram á sama støði í 2020. Samlað sæð er arbeiðsloysi lágt.

Rentustøðið á heimsmarknaðinum - og ikki minst í Danmark - hevur verið lágt í 2019, og tað eru ikki útlit til, at hettar broytist munandi í 2020. Harafturat eru bankarnir í Danmark, Grønlandi og Føroyum fyri ávísar kundabólkar farnir at taka negativar rentur av innlánum. Hetta fevnir um stovnar sum Útnorðurgrunnin. Lága rentustøðið fer at ávirka úrslitið hjá Útnorðurgrunninum negativt fyri 2020. Tann lága rentan hevur við sær at Grunnurin í 2020 kemur at hava undirskot av rakstrinum áðrenn avsetingar. Grunnurin vil royna at fáa fleiri útlán í 2020. Tað vil eisini verða gjørdar sparingar í rakstrinum.

Fyri ársbyrjan breyt ein virussjúka út í Kina. Sjúkan er ein pandemi, og er spjadd um meginpartin av heiminum. Síðani miðjan mars er stór afturgongd í virkseminum í Vesturheiminum vegna pandemiina. Tað hevur havt stóra búskaparliga afturgongd við sær, og ferðavinnan hevur nærum einki virksemi. Fleir kundar hjá Grunninum verða raktir av íkomnu støðuni. Hjá hesum lántakarum hjá Grunninum, má Grunnurin taka atlit til gjaldførisstøðuna hjá fyritøkunum til støðan aftur gerst normal.

Grunnurin fer tí at gera stór átøk, partvís at økja vitaninna um Grunnin, og partvís finna nýggjar fíggingarmøguleikar, soleiðis at Grunnurin kann tæna sínum endamáli  og virka fyri at fremja menning í einum fjølbroyttum og kappingarførum vinnulívi í útnorðri. Grunnurin væntar fleiri útlán í 2020 enn í 2019.

Nevndarinnar innsatsætlan fyri árini 2018 og 2019 kann lesast á heimasíðuni hjá Útnorðurgrunninum, www.vestnorden.is. Ein nýggj innsatsætlan fyri 2020 – 2021 bíðar til man sær hvussu gongdin verður eftir Covid-19 kreppuna.

## ÁTEKNING LEIÐSLUNNAR

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðkent ársroknskapin hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019. Vit meta, at tann valdi roknskaparhátturin er hóskandi og gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum, fíggjarstøðu og úrsliti, umframt peningastreymi fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2019.

***Karin Pedersen Thorsen***
Grønland - formaður

***Árni Dam***
Føroyar – næstformaður

***Børge Petersen***
Danmark

***Christell Åström***
Finland

***Ásgerður Kristín Gylfadóttir***
Ísland

***Maria Olofsson***
Sverige

***Tor-Egil Lindeberg***
Noreg

Undirskrivað á nevndarfundi í Reykjavik, tann 28. apríl 2020:

***Sverri Hansen***
Forstjóri

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

***Til leiðslu og eigarar av Menningargrunni Útnorðurs***

***Niðurstøða***
Vit hava grannskoðað ársfrágreiðingina hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1.januar til 31. desember 2019. Ársfrágreiðingin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu, viðmerkingar og nýttan roknskaparhátt, og at ársfrágreiðingin er gjørd í samsvari við lóggávuna um ársroknskap í Íslandi.

Tað er fatan okkara, at ársfrágreiðingin gevur eina rættvísandi mynd av Menningargrunni Útnorðurs fyri árið 2019, hansara ognum og skuldum og fíggjarstøðu við árslok 2019 og av úrslitinum av virkseminum hjá Menningargrunni Útnorðurs fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2019, og í tráð við ársroknskaparlógina.

***Grundarlag fyri niðurstøðuni***
Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan. Ábyrgd okkara sambært hesum standardum er nærri greitt frá í stykkinum Grannskoðanarábyrgd. Tað er okkara fatan at vit við okkara gjøgnumgongd hava fingið nøktandi og týðandi prógv, sum kunnu vera grundarlag fyri okkara niðurstøðum.

***Óheftni***
Vit eru óheft av Menningargrunni Útnorðurs samsvarandi teimum altjóða grannskoðarareglunum (IESBA-reglunum) og teimum galdandi etisku reglunum í Íslandi og hava yvirhildið teirra aðrar fyriskipanir.

***Ábyrgd leiðslunnar av frágreiðingini***
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd, og sum er í samsvari við lóg um ársroknskap. Leiðslan hevur eisini ábyrgd av innanhýsiseftirliti, og sum leiðslan metir at vera neyðugt fyri at kunna gera ein ársroknskap, sum ikki hevur týðandi villur, hóast tað skyldast svik ella feilir. Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgd av at meta, um Menningargrunnur Útnorðurs er førur fyri framhaldandi rakstri; at upplýsa um viðurskifti um framhaldandi rakstur, har hetta hevur týdning; og at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginreglum fyri framhaldandi rakstri. Um so ikki er, at leiðslan ætlar at likvidera Menningargrunn Útnorðurs, steðga rakstrinum, ella ikki hevur annað val enn at gera tað.

***Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðan av ársroknskapinum***
Okkara mið er at fáa eina grundaða vissu fyri, um ársroknskapurin sum heild er uttan týðandi feilupplýsingar, sjálvt um tað er grundað á svik ella feilir, at geva eina grannskoðara átekning við einari niðurstøðu. Ein grundað vissa er ein stór trygd, men ikki eitt garanti fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir altjóða meginreglum um grannskoðan, og tey eyka krøv, sum eru galdandi í Íslandi, altíð kunna avdúka týðandi feilir, tá slíkir finnast. Feilupplýsingar kunnu koma fyri sum svik ella feilir, og kunnu roknast sum týðandi, um tað við rímiligheit kann roknast við, at teir einkultvís ella samlað hava ávirkan á tær búskaparligu avgerðir, og sum roknskaparbrúkarin tekur við støði í ársroknskapinum.

Sum lið í einari grannskoðan, og sum verður gjørd sambært altjóða meginreglum um grannskoðan, og saman  við teimum øktu krøvum, sum eru galdani í Íslandi, gera vit eina fagliga metan og halda ein professionellan skepsis undir grannskoðanini.

***Herumframt***
Eyðmerking og metan av váða fyri týðandi feilupplýsingum í ársroknskapinum verður gjørd. Hóast talan er um svik ella feilir, verður grannskoðanararbeiðið lagt til rættis og framt  sum andsvar til hesar váðar og fáa sum andsvargrannskoðanarsannanir, sum eru nóg miklar, og egnaðar sum grundarlag fyri okkara niðurstøðu. Vandin fyri ikki at avdúka týðandi feilupplýsingar grundað á svik er størri enn feilupplýsingar, grundaðar á feilir, tí svik kann fevna um samansvørjing, skjalafalsan, tilviljað ikki at upplýsa villleiðing ella seta til síðis innanhýsiseftirlit.

Vit náa fatan av innanhýsiseftirlitinum, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis, og sum er hóskandi eftir umstøðunum, men ikki fyri at koma við niðurstøðu um effektivitetin av innanhýsiseftirlitinum hjá Menningargrunni Útnorðurs.

Vit taka støðu til, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan hevur nýtt, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tegndir upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

Koma vit til ta niðurstøðu, at tann av leiðsluni gjørdi ársroknskapur, og sum byggir á roknskaparliga meginreglu um framhaldandi rakstur, er hóskandi, og at tað við grundarlagi í grannskoðanarprógnum vísir seg, at tað eru týdandi óvissur tengdar at tilburðum ella viðurskiftum, og sum kunna hava við sær mundandi iva, um Menningargrunnur Útnorðurs kann rekast við framhaldandi rakstri. Koma vit til ta niðurstøðu, at tað eru týðandi ivamál, so skulu vit í okkarar grannskoðaraátekning gera vart við hesar upplýsingar í ársroknskapinum, ella um slíkir upplýsingar ikki eru nóg ivaleysir,

so tillaga vit niðurstøðuna. Okkarar niðurstøða byggir á grannskoðanarprógv, og sum eru fingin til vega fram til dagfestingina av grannskoðanarátekningini. Framtíðarhendingar ella viðurskifti kunnu tó hava við sær, at felagið ikki longur kann halda fram við rakstrinum.

Vit taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnað og innihald í ársroknskapinum og viðmerkingum, og um ársroknskapurin vísir rørslur og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um m.a. ta tilrættalegging og ta tíðarætlan av grannskoðanini, og um tað eru týðandi grannskoðanarviðrakingar (observationer), herundir møguliga manglar í innanhýsiseftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

***Meting av leiðslufrágreiðing***

Leiðslan hevur ábyrgd av leiðslufrágreiðingini. Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og kemur ikki við nakrari meting av niðurstøðum um trygd av leiðslufrágreiðingini.

Í samband við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í tí sambandi meta, um tað er týðandi mótsvar til ársroknskapin ella okkara vitan, sum vit hava útvegað við grannskoðanini ella á annan hátt tykjast at innihalda feilupplýsingar.

Okkara ábyrgd er harafturat at meta, um leiðslufrágreiðingin inniheldur kravdar upplýsingar sambært ársroknskaparlógini.

Grundað á tað gjørda arbeiðið er tað okkarar fatan, at leiðslufrágreiðingin samsvarar við ársroknskapin, og at hon er gjørd sambært krøvum í ársroknskaparlógini. Vit hava ikki funnið týðandi feilupplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Reykjavík, tann 29. apríl 2020



***Ásbjörn Björnsson***
Løggildur grannskoðari



***Gunnar Þór Tómasson***
Løggildur grannskoðari

# RAKSTRARROKNSKAPUR *1. januar - 31. desember 2019*

| | Viðmerkingar | 2019 DKK | 2018 DKK |
|---|---|---|---|
| RENTUINNTØKUR | | | |
| Rentuinntøkur frá bankainnlánum | | (53.973) | 28.736 |
| Rentuinntøkur frá útlánum | 3 | 2.253.896 | 2.542.526 |
| Gjaldoyra og virðisjavni | | (9.758) | 9.967 |
| | | 2.189.965 | 2.581.229 |
| AÐRAR INNTØKUR | | | |
| Aðrar inntøkur | | 58.020 | 58.020 |
| | | 58.020 | 58.020 |
| **Rakstrarinntøkur tilsamans** | | 2.247.985 | 2.639.249 |
| RAKSTRARÚTREIÐSLUR | | | |
| Lønarútreiðslur v.m. | | | |
| til fyrisiting og nevnd | 5 | 1.734.671 | 1.842.338 |
| Útreiðslur til fyrisiting | 3,5 | 1.130.983 | 1.054.574 |
| Avskrivingar, íbúð | 6 | 51.972 | 51.972 |
| **Fyrisiting tilsamans** | | 2.917.626 | 2.948.884 |
| Tap og burturleggingar í árinum | 4 | (5.278.514) | (839.683) |
| **Tap og burturleggingar tilsamans** | | (5.278.514) | (839.683) |
| **Rakstrarútreiðslur tilsamans** | | (2.360.888) | 2.109.201 |
| AVLOP | | 4.608.873 | 530.048 |

## **FÍGGJARSTØÐA** *tann 31. desember 2019*

| **Ogn** | **Viðmerkingar** | **2019 DKK** | **2018 DKK** |
|---|---|---|---|
| *GJALDFØRI* | | | |
| Bankainnlán | | 70.405.744 | 47.069.026 |
| **Gjaldføri tilsamans** | | 70.405.744 | 47.069.026 |
| *ÚTLÁN* | | | |
| Útlán | 3 | 54.869.950 | 73.512.875 |
| **Útlán tilsamans** | | 54.869.950 | 73.512.875 |
| *MATERIELL STØÐISOGN* | | | |
| Íbúð | 6 | 2.315.652 | 2.367.624 |
| **Materiell støðisogn tilsamans** | | 2.315.652 | 2.367.624 |
| *AÐRAR OGNIR* | | | |
| Skuldarar | | 23.389 | 35.053 |
| **Aðrar ognir tilsamans** | | 23.389 | 35.053 |
| *OGN TILSAMANS* | | 127.614.739 | 122.984.578 |

| **Skyldur** | **Viðmerkingar** | **2019 DKK** | **2018 DKK** |
|---|---|---|---|
| *ONNUR SKULD* | | | |
| Ognarar | | 113.805 | 92.521 |
| **Onnur skuld tilsamans** | | 113.805 | 92.521 |
| *LÁN* | | | |
| Lán - íbúð | 7 | 567.000 | 567.000 |
| **Lán tilsamans** | | 567.000 | 567.000 |
| *EGINOGN* | | | |
| Stovnspeningur | | 91.284.091 | 91.284.091 |
| Tiltakspeningur, primo | | 31.040.966 | 30.510.918 |
| Flutt frá ársins úrsliti 2019 | | 4.608.873 | 0 |
| Flutt frá ársins úrsliti | | 0 | 530.048 |
| **Eginogn tilsamans** | 8 | 126.933.930 | 122.325.057 |
| *SKYLDUR TILSAMANS* | | 127.614.735 | 122.984.578 |

## PENINGASTREYMSÚTGREINING *fyri 2019*

| | 2019 DKK | 2018 DKK |
|---|---|---|
| *PENINGASTREYMUR FRÁ RAKSTRI* | | |
| Úrslit ársins | 4.608.873 | 530.048 |
| Postar, íð ikki hava ávirkan | (5.226.542) | (787.711) |
| **Broytingar frá rakstrarroknskapi** | (617.669) | (257.663) |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ LØGUM* | | |
| Avdráttir frá útlánum | 20.160.834 | 11.814.120 |
| Útgoldin nýggj lán | (2.500.000) | (1.250.000) |
| Innloyst veð | 6.260.605 | 0 |
| Skuldarar | 11.664 | (9.024) |
| **Broytingar, løgur** | 23.933.103 | 10.555.096 |
| *PENINGASTREYMUR FRÁ FÍGGING* | | |
| Ognarar | 21.284 | (24.076) |
| **Broytingar í fígging** | 21.284 | (24.076) |
| **Ársins peningastreymur frá rakstri, løgum og fíggin** | 23.336.718 | 10.273.357 |
| **Gjaldføri primo** | 47.069.026 | 36.795.669 |
| **Gjaldføri ultimo** | 70.405.744 | 47.069.026 |

# VIÐMERKINGAR

## 1. Upplýsingar um Menningargrunn Útnorðurs

Virksemið hjá Menningargrunni Útnorðurs er at læna pengar út til fyritøkur í Grønlandi og Føroyum, og undir ávísum umstøðum eisini í Íslandi. Høvuðssætið hjá Menningargrunni Útnorðurs er í Sigtúni 42, 105 Reykjavík, Ísland.

## 2. Nýttur roknskaparháttur

*Roknskaparháttur alment*
Ársroknskapurin er gjørdur í samsvari við lóg um ársroknskap í Íslandi. Ársroknskapurin er gjørdur eftir sama roknskaparhátti sum í fjør. Øll roknskapartøl eru í donskum krónum.

*Virðisásetan*
Roknskapurin er gjørdur út frá ávísum fyritreytum, sum eru grundaðar á ávísar metingar. Hesar metingar ger leiðslan í Menningargrunni Útnorðurs í samsvari við nýttan roknskaparhátt, og við støði í søguligum royndum og fyritreytum, og sum leiðslan metir vera álítandi og realistiskar. Søluvirðið kann víkja frá mettum virði.

*Gjaldoyra kursjavnan*
Rørslur í útlendskum gjaldoyra verða bókaðar til tann kurs, sum er galdandi tann dagin, rørslan fer fram. Fíggjarlig ogn og skuld í útlendskum gjaldoyra verða virðisásett í roknskapinum við tí kursi, sum er galdandi ultimo í árinum. Kursbroytingar verða bókaðar í rakstrarroknskapinum. Kursurin ultimo 2019 var 0,055 (ISK/DKK), og ultimo 2018 0,056 (ISK/DKK)

*Materiell ogn*
Materiell ogn er tikin við í roknskapinum til útveganarvirðið, frádrigið avskrivingar.

*Útlán*
Útlán eru tikin upp til nominelt virði, og við burturleggingum móti tapi, sum ikki er staðfest. Burturleggingar av útlánum verða gjørdar bæði á hvørt einstakt lán og á bólkar av lánum.

*Burturleggingar av útlánum*
Burturleggingar av útlánum endurspegla tann váða, sum er tengdur at útlánsvirksemi. Talan er ikki um staðfest tap av útlánum. Broytingar í burturleggingum og staðfestum tapum síggjast í rakstrarroknskapinum og viðmerkingunum.

*Gjaldføri*
Gjaldførið í fíggjarstøðuni og peningastreymsútgreiningini fevnir um kassapening og bankainnlán.

*Inntøkur*
Inntøkur, t.v.s rentur av teimum lánum, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur goldið út, verða inntøkuførdar, tá ið terminsútskrivingin verður gjørd.

*Skattur*
Útnorðurgrunnurin er sambært lóg nr. 65/1982 um skattskyldu fyri fíggingarfyritøkur frítikin fyri at galda inntøku-skatt. Útnorðurgrunnurin er eisini frítikin fyri skattskyldu av fíggjarligum inntøkum, hettar sambært lóg 94/1996 um skattaálíkning av fíggjarligum inntøkum.

## 3. Útlán

*Útlán greinað á lond*

| | Føroyar | Grønland | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Samlað útlán | 16.039.605 | 38.830.345 | 54.869.950 |
| Rentuinntøkur av lánum | 856.392 | 1.397.304 | 2.253.696 |

Undir rentuinntøkum stava 25.000 DKK frá lántøkugjøldum. Undir fyrisitingarkostnaði eru bókaðar 37.000 DKK, sum eru útreiðslur til advokatar fyri teirra arbeiði at skriva lánsskjøl og fáa tey tinglýst.

*Lán hjá Menningargrunni Útnorðurs*

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| Hotell og ferðavinna | 58.72% | 55.13% |
| Handverk og smáídnaður | 23.14% | 29.53% |
| Fiskiídnaður | 5.04% | 10.04% |
| Aðrar vinnur | 13.10% | 5.30% |
| | 100% | 100% |

*Lán hjá Menningargrunni Útnorðurs greinað eftir restafturgjaldstíð*

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| Avdráttir, íð falla innan 1 ár | 19.117.258 | 11.115.436 |
| Avdráttir, íð falla eftir einum ári og innan 5 ár | 20.758.332 | 38.120.102 |
| Avdráttir, íð falla eftir 5 árum | 14.994.360 | 24.277.337 |
| | 54.869.950 | 73.512.875 |

## 4. Burturleggingarkonto fyri útlán

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| Burturleggingar primo | 10.927.687 | 11.767.370 |
| Burturlagt í árinum | (5.278.514) | (839.683) |
| Burturlagt ultimo | 5.649.173 | 10.927.687 |
| Burturlagt sum prosent av samlaðum útlánum | 9.33% | 12.94% |

## 5. Lønarútreiðslur

Lønarútreiðslur vóru tilsamans 1.734.667 DKK. Tað var løn til stjóra og starvsfólk uppá 1.664.667 DKK og samsýning til nevnd, sum er 70.000 DKK. Nevndarsamsýningin er 10.000 DKK árliga fyri hvønn lim og 20.000 DKK til nevndarformannin. Harafturat fáa nevndarlimirnir fundarsamsýning fyri hvønn fund eftir galdandi reglum hjá Norrønu Ráðharranevndini. Tvey limalond hava fráskrivað sínum nevnarlimum rætt til nevndarsamsýning.
Útreiðslur til grannskoðan vóru 109.240 DKK.

## 6. Materiell støðisogn

| | 2019 | 2018 |
|---|---|---|
| Útveganarvirði | 2.887.344 | 2.887.344 |
| Avskrivað primo | (519.720) | (467.748) |
| Avskrivað í árinum | (51,972) | (51.972) |
| Bókað virði ultimo | 2.315.652 | 2.367.624 |
| Avskrivingartal | 2% | 2% |

## 7. Lán- íbúð

Afturgjaldingin av lánunum, sum Menningargrunnur Útnorðurs hevur tikið, byrjar í 2028, og lánini verða afturgoldin yvir 15 ár. Lánini eru rentufrí fram til 2028, tá ið afturgjaldingin byrjar. Tey rentu- og avdráttarfríu lánini eru veitt av Naalakkersuisut og Kommuneqarfik Sermersooq, við somu upphædd frá hvørjum.

## 8. Eginogn

*Egenkapitalskonto*

| | Stovnspeningur | Tiltakspeningur | Úrslit ársins | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| Eginogn primo | 91.284.091 | 30.510.918 | 530.048 | 122.325.057 |
| Sett í! tiltaksgrunn | 0 | 530.048 | (530.048) | 0 |
| Úrslit ársins | 0 | 0 | 4.608.873 | 4.608.873 |
| Eginogn ultimo | 91.284.091 | 31.040.966 | 4.608.873 | 126.933.930 |